Gigni bjóðar øllum næmingunum í 9. flokki eina útskúlakanning.

Í tí sambandi hava allir næmingarnir fingið eitt skriv heim við, sum eitur: ”Samtykki til útskúlakanning”. Hetta skrivið skal undirskrivaðast og latast aftur til flokslæraran skjótast gjørligt.

Útskúlakanningin umfatar funktiónskanningar (sjón, litsansur, hoyrn, hædd og vekt), og eina persónliga samrøðu við næmingin um lívsstíl, trivnað og likamliga, sálarliga og kynsliga heilsu. Somuleiðis bjóðar heilsufrøðingurin seksual undirvísing saman við flokkinum.

Útskúlakanningarnar byrja komandi vikurnar. Foreldur eru vælkomin at seta seg í samband við heilsufrøðingin, um tørvur er á hesum, áðrenn tosað verður við títt barn.

**GIGNI - heilsufrøði til børn & ung**

Niels Finsensgøta 37 • Postboks 132 • 110 Tórshavn • Tlf. 614 000www.gigni.fo • gigni@gigni.fo